# TILTØK

**Gudstænastur**
**9. sunnudag e. Trinitatis**
***Havnar kirkja:*** kl. 11.00: Sonja Klein, talvan gongur fyri KFUM í Havn
***Vesturkirkjan:*** kl. 11.00: Heri Joensen
***Argja kirkja:*** kl. 11.00: Bjarni D. Joensen
***Kaldbak:*** kl. 12.00: Bjarni Bæk
***Gjógv:*** kl. 11.00: Messa, Sverri Steinhólm
***Selatrað:*** kl. 11.00: altarg., Jógvan Fríðriksson
***Funningur:*** kl. 12.30: Messa, Sverri Steinhólm
***Skopun:*** kl. 12.00: Emil Olsen
***Klaksvíkar sjúkrahús:*** kl. 10.00,
***Norðoya røktarheim:*** kl. 14.30: Elsa Funding
***Kunoy:*** kl. 12.00: Niels Pauli Danielsen, altargangur
***Húsar:*** kl. 11.00: altarg., Hans Eiler Hammer. Í hesum sambandi verður nýggjur messuakul tikin í nýtslu

**Katólska Kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit.
Sunnudag kl. 11.00 Orðsins tænasta v/ kommunión í Mariukirkjuni.
www.katolsk.fo

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag, kl. 6.00 Morgunbøn.
Fríggjadagin kl. 6.00 Morgunbøn, kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 17.00 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti v/ Rúna Rasmussen, aftaná kaffisteðgin er summarskúlin fyri børn,
kl. 22.00 Útimøti á Vaglinum. Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067.
www.filadelfia.fo

**Hebron, Argir**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bíbliutími og bønarløta.
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing. Á møtinum talar Benny Drewsen.
www.hebron.fo

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00 Evangel. møti við Rigmor og John Fonsdal.
Týskvøldið kl. 20 Bønarmøti.
www.gospel.fo

**Frá Ebenezer**
Mikudag kl. 20.00 Bønar- og uppbyggingarmøti, Inga McKendry, trúboðari í Meksiko greiðir frá.
Leygardag kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudag kl. 10.00 Breyðbróting. Sunnudagsskúlin í summarfrí, kl. 18 Evangel. møti. Talari: Peter Glasgow frá Hebron Evangelical Church í Aberdeen. Øll eru vælkomin.
www.ebenezer.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa í kvøld kl. 19.30. Leivur á Lakjuni talar og greiðir frá trúboðaraskipinum Doulos. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**KFUM og KFUK í Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20 Bíbliutími v/ Petur M. Glerfoss. Evnið: »Gleði tykkum í Harranum«.
Fríggjakvøldið kl. 22.00 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18.00 Møti við Johannes Miðskarð, kl. 21.00 Ungdómsmøti. Øll eru vælkomin.
www.kuff.fo

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bíbliutími, 1. Kor. 5. kap.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Leygardagin kl. 20.00 Útimøti í Hvalba og kl. 21.30 í Sandvík.
Sunnudagin kl. 18.00 Evangel. møti, Magnus Jensen talar.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***Frá 4.–26. juli er Tilhaldið opið kl. 10.00–17.00.***
***27. juli er stongt vegna fyrireiking av Ólavsøkuframsýningini.***
***Á Ólavsøku verður ein framsýning av barnamyndum frá 1920–1945.***
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Frítíðarfelagið Antares**
skipar fyri mannfólkatúri út í Mykines leygardagin tann 23. juni. Farið verður av Sørvági kl. 10.00 við báti, og verða vit víst runt har úti við lokalari guide. Umleið kl. 16.00 fáa vit ein góðan bita í Kristianshúsi. Vit vera aftur á Sørvági uml. kl. 18. Samlaður prísur fyri tiltakið er 375,- kr. pr. nøs. Tunnilsgjald er 170,-/bil. Tekning fer fram á 590100/271110 ella 333383. Eisini kann teldupostur sendast til sonny@post.olivant.fo
Seinasta freist at tekna seg er fríggjadagin tann 22. juni kl. 12.00.

**AGLOW-Føroyar**
hátíðarheldur 20 ára dag við stevnu á Hotel Føroyum í døgunum 9.-11. september. Talari er Sarah Catarino, Portugal. Tilmelding á tlf. 447825 ella teldupost eile-r@kallnet.fo
Ynskist innivist ella mat er seinasta freist 5. august annars 20. august. Stevnan er bæði fyri kvinnur og menn.

**Dagtilhaldið Fløvi**
Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Tlf. 448279. Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið er mánadag til fríggjadag kl. 15 – 18. *Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Tú ert vælkomin at hava títt egna hondarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Frits Jacobsen, tlf. 332053 ella ein av nevndarlimunum.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
**er í summarfrí frá 1. juli til 5. september 2005.** Tá verður spælistovan í Margarinfabrikkini.

**AA-fundir í Havn**
<u>Tinghúsvegur 37</u>
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.00 Stóri bókafundur
Mikudag: kl. 20.00–21.00 Stiga- og siðafundur
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00 og kl. 22.30-23.30
Kvinnufundur kl. 20–21.00.
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**NA (Anomymir narkomanar)**
<u>Tinghúsvegur 37</u>
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**Al-Anon**
Fundir fyri avvarðandi at alkoholikarum er mánakvøld kl. 21.00 á Glyvrum. Í gomlu lærara íbúðini í Glyvra skúla.

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Fyribyrgingarráðið**
*Argjaboðagøta 7 · 160 Argir*
*postrúm 135 · 110 Tórshavn*
tlf. 315155 · fax 320272
Teldupostadr.: fyribyrg@fyribyrg.fo
heimasíða: fyribyrg.fo

**Giktafelag Føroya**
**MBF-húsið**
**Íslandsvegur 10c**
**100 Tórshavn**
Tlf: 310237
Opið er týs og hósdag frá 13:00 til 16:00.
**(Tó stongt vegna summarfrí 18.7-15.8.2005)**

**Hjartafelagið**
Postboks 3120, 110 Tórshavn
e-mail: <u>hjartafelag@hotmail.com</u>

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið: Ella 316261, Tone 261165, Hans Jákup 778170, Guðrið 314607. Arni 222552

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894.
Fø. Sparikassi 442027-8.

## Brúdleyp

Fríggjadagin 22. juli 2005 kl. 16.30 giftast í Dómkirkjuni Beinta Fossádal, Tórshavn og Halldór Matthias Sigurðsson, Reykjavík. Veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum kl. 18.00.

Leygardagin 23. juli kl. 16.00 giftast í Sørvágs kirkju Marian Skaalum, Sørvágur og Henrik Lundgren, Skovlunde. Dagurin verður hildin saman við innbodnum í Húsmøðrafelagshúsinum í Sørvági.

Leygardagin 23. juli kl. 16.00 giftast í Vesturkirkjuni, Herborg Líggjasardóttir Joensen, Tórshavn og Rúni Magnus Johannesen, Argir. Veitslan verður fyri innboðin í HB-húsinum kl. 19.00.

Leygardagin 23. juli kl. 15.00 giftast í Freerslev kirkju á Sælandi, Flóvin þór Næs úr Havn og Birgitte Kragh Nygaard úr Haslev. Brúdleypsadressan er Sørup Herregaard, Sørupvej 26, DK-4100 Ringsted.

Leygardagin 23. juli kl. 17.00 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík Eina Hansen og Kristian Eliasen. Veitslan verður fyri innbodnum í Skálanum kl. 19.00.

Leygardagin 23. juli kl. 17.00 giftast í Dómkirkjuni Joan Joensen, Tórshavn og Jens Jacob Nissen, Søborg. Veitsla verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum.

Leygardagin 23. juli kl. 18.00 giftast í Dómkirkjuni Jónrit Nielsen og Erling Dalsgaard, Tórshavn. Veitslan verður fyri innbodnum í hølunum hjá Havnar Róðrarfelag í Álakeri.

Leygardagin tann 30. juli kl. 14.00 giftast í Miðvágs kirkju Elin S. Joensen, Miðvágur og Tór-Ingar Akselsen, Sandavágur. Døgurði verður fyri innbodnum. Vælkomst verður í SÍF-húsinum í Sandavági frá kl. 20.30.

Leygardagin 30. juli kl. 14.00 giftast í Betania í Skopun Davia Gertrud Nicolajsen, Skopun og Hans Jacob Reinert Petersen, Saltnes. Tey, ið vilja gleðast saman við okkum, eru vælkomin inn á gólvið hjá Arndis og Jógvan Hendrik Nicolajsen, Skopun, frá kl. 19.00.

Leygardagin 6. august giftast í Godthåb kirkju, Godthåb, Svenstrup, Helen Houmøller og Jens Rasmussen úr Kollafirði. Adressan er Kildevej 10, Godthåb, DK 9230 Svenstrup.

Leygardagin 6. august kl. 11.00 giftast í Berøa, Saltangará, Linda Jacobsen, Vatnsoyrar og Janus Kannuberg, Runavík. Høvi verður at heilsa uppá brúðarparið í Berøa millum kl. 13.00 og 17.00.

Leygardagin 6. august kl. 13.00 giftast í Kaldbak Sólmei Eydna Rasmussen, Kaldbak og Finn Nolsøe, Kaldbak. Veitslan verður í Róðrarneystinum á Argjum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 22. juli á tlf. 311999 ella 316797.

Leygardagin 6. august kl. 14.00 giftast í Sjóvar kirkju Anna Elisa Jógvansdóttir, Innan Glyvur og Jimmi Højrup Jepsen, Esbjerg. Veitslan verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, vera biðin um at boða frá á tlf. 447495, 272740 ella 252361, ella skriva til aj_elisa@hotmail.com áðrenn 20. juli.

Leygardagin 6. august kl. 14.00 giftast í Nebo á Toftum, May í Túni og Jan Højgård, Toftir. Veitslan verður kl. 18.00 á Svangaskarði. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 449640, 260817, 447647 ella 227230 áðrenn 28. juli.

Leygardagin 13. august kl. 14.00 giftast í Fríðrikskirkjuni, Rannvá Lind Helgadóttir, Vestmanna og Borgar Hansen, Nes. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 449988, 424511, 584430 ella 504040 innan 1. august.

Fríggjadagin 19. august kl. 15.00 giftast í Ebenezer í Tórshavn, Rakul Andreassen, Tórshavn og Eyðfinn Olsen, Klaksvík. Veitslan verður á Hotel Føroyum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við atkoma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 5. august á tlf. 226922 ella 229516.

**Silvurbrúdleyp**
26. juli hava Ann-Bjørg og Sunnleif Jacobsen, Sandavágur, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin 23. juli. Opið hús verður í Missiónshúsinum í Sandavági frá kl. 15.00 til 21.00.

Týsdagin 9. august hava Sanna og Bjørn Akselsen, Sandavágur silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 6. august. Opið hús verður í meinigheitshúsinum í Sandavági frá kl. 15.00 til 21.00.

**90 ár**
Fríggjadagin 22. juli verður Linda Nolsøe, Oman Mattalág 11, 90 ár. Dagurin verður hildin heima frá kl. 15.00 til 18.00. Øll eru vælkomin.

Sunnudagin 24. juli fyllir Mathilda Weihe av Seltrað 90 ár. Føðingardagurin verður hildin í Sambýlinum Vesturskin á Toftum frá kl. 17.00 til 20.00.